Lesarabrøv

Privatisera Standfaraskip Landsins?

Ørvitistos!

Hetta er bert eitt dømi av mongum um, hvussu stutt okkara fólkavaldu hugsa.

Strandferðslan er ein av teimum fáu almennu stovnunum, ið hevur eina inntøkusíðu saman við einari útreiðslusíðu.

Útreiðslusíðan kann geva eitt støðugt afturvendandi milliónahall, men hetta kanst tú ikki lasta stovninum fyri, tí Strandferðslan hevur altið verið neyvt stýrd av politikarunum; ein ynskir meiri sigling til Klaksvíkar, annar meiri sigling til Suðuroynna o.s.fr.

Tey seinastu dømini eru enn ikki gloymd: Lasse keypti Dúgvuna, Svend Åge setti Sam til náttarsigling, Signar kravdi Ternuna 1 á Skálafjørðin o.m.a.

Hetta kanst tú ikki lasta Strandferðsluna fyri, men bert politikarunum sjálvum. Nú hava teir so funnið frensin: Privatisering.

Eg spyrji bara: Hvør vil hava rutuna Hvannasund/Svínoy, ið gevur milliónahall? Hvør vil hava rutuna Tórshavn/Tvøroyri, ið gevur fleiri milliónahall?

Og so tann stóri spurningurin: Bert tvær rutur sigast geva yvirskot, hvør skal fáa tær? Man ikki tann fremsta treytin vera tann, at partíkortið er í ordan?

Minnist til, at hesar rutur geva íkast til aðrar rutur, og skal inntøkustíðan minkast, so veksur útreiðslusíðan, tvs. meira til Palleba at gjalda, meðan Fossadun fær inntøkurnar.

Tað hava fyrr verið gjørdar royndir at privatisera partar av SL. Sum er fáa lastbilførararnir eina vanliga verkamannaløn, undir privatiseringini fingu teir 60–70.000 kr. um mánaðin.

Er tað tað, ið skal innførast aftur? (minnist til, at tað framvegis er skattgjaldarin, ið skal gjalda).

Skattgjaldari, ið longu heldur seg hava ivaleyst at gjalda

ADC-Heilsølan

Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 15828 - Fax 15893

ARBEIÐSHANDSKAR

til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

FØROYA HANDILSSKÚLI

KVØLDSKRÁIN Á HANDILSSKÚLANUM
Skúlaárið 1994/95
FHS - HH STAKROYNDIR

INNSKRIVINGARSEÐIL

Setið x í rútin (ljósur) fyri tær ynsktu lærugreinirnar

NR.	FHS LÆRUGREINIR
1	Bú- og Roknskapur
2	Maskinskriving, teld og samskifti
3	Enskt II
4	Enskt III
5	Týskt I
6	Týskt II
7	Søla & tænasta
	HÆGRI STAKROYNDIR Á HH STØÐI
21	Roknskaparlæra/virkisbúskapur B *)
22	Støddfrøði B (treyt fyri at sleppa inn á HD)

1. Tími 17.45 - 18.30
2. Tími 18.30 - 19.15
3. Tími 19.20 - 20.15
4. Tími 20.15 - 21.00

MÁNADAG				MIKUDAG			
1	2	3	4	1	2	3	4

Hvørja skúlagongd hevur tú áður:

FÓLKASKÚLA

7. Fl.___ 9. Fl.___ 10. Fl.___

Hevur tú gingið á handilsskúla áður?

Ja ___ Nei ___ Um ja í hvørjari lærugrein:

_____ ÁR

_____ ÁR

_____ ÁR

Onnur útbúgving:

_____

_____

*) Fortreyt til Roknskaparlæru/virkisbúskap B: Rokning og roknskapur, Bú- og roknskapur ella líknandi.
*) Treyt fyri at sleppa inn á HD 1. part.

Ert tú í læru Ja ___ Nei ___ (skal útfyllast)

Ættarnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Tlf. heima:
Bústaður:	Tlf. arbeiðspláss:
Bygd/býur:	Starv:

Skal verða skúlanum í hendi innan 8. august 1994.

Depositum kr. 250,00

Innskrivingargjald kr. 300,00

Skúlagongdin byrjar mánadagin 29. august

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku og mynduleika góðkenning.

Eru ov nógv til ein flokk, verða næmingamir tiknir inn í teirri rað, teir hava skrivað seg inn.

_____ undirskrift

_____ dagur

Skúlin er vegna summarfrí stongdur frá 16. juli til 1. august.

Umsóknarblað er eisini at fáa á Landsbókasavninum, Býarbókasavninum, Kunningarstovuni og Postverk Føroya

FØROYA HANDILSSKÚLI - Marknagilsvegur 77 - Postbox 177 - 110 Tórshavn - Telefon 17177 - Telefax 13374

75-93037.HMX

BRÚKTIR BILAR!

Vit hava fleiri GÓÐAR BRÚKTAR BILAR av ymiskum merkjum til sølu.

SERA BÍLIGA & LAGALIGA

Ynskja tygum at sýna/royndarkoyra teir, kann hetta avtalast á tlf. 18903.

Rann Teld

v/ Atla Klein Olsen
Postboks 205
110 Tórshavn
Fax.: 18703
Tlf. 18903 - 88903